# BILRADIO

**Aktuel biltíðindi við Maggi Gunnarsson**

## Hósdagin 2. september kl. 16.10

Í sendingini Bilradio á Rás2 hósdagin 2. september kl. 16.10 verður samrøða við hjúnini Catharinu og Bert Öhman úr Svøríki, sum hava ferðast í umleið 50 londum kring heimin í sínum Saab 900 kampingbili.

Eisini er samrøða við Bergur Andreasen frá Kaj Andreasen & Co í Hoyvík um m.a. viðsfestisvognar og innrætting av vørubilum. Samrøða er eisini við Heðin Kjelnæs um útferðir við bussinum hjá Hotel Tórshavn í Keypmannahavn.



*Heðin Kjelnæs*



*Bert og Catharina Öhman*




*Bergur Andreasen*



*Pláss er til tvey fólk, sum kunnu sita til borðs í kampingbilinum*



*Her eru tey við bilinum saman við einum fíli á gøtunum í India*



# MC-Boogie leygardagin

Síðsta tiltak í summarskránni hjá áhugafelagnum Føroya Ellisakførí 2010 er MC-Boogie, sum verður leygardagin 4. september.

Sum sigur er, so eru tvey MC-Boogie um árið, har Føroya MC skipar fyri tí fyrra, og Føroya Ellisakfør skipar fyri tí seinna.

Koyringin byrjar við at motorsúkklukoyrararnir hittast í felagshølinum hjá Føroya Ellisakførum yviri við Strond kl.12.00, og koyrt verður stundisliga kl.13.

Kl.13.45 verður støðgur hjá OK-Heilsølu í Hvalvík, har uppsamling verður av motorsúkklukoyrarum. Síðan verður koyrt til Saksunar, og aftaná til Fuglafjarðar um Eiðisskarð um viðrar. Eftir ein rímiligan steðg verður farið eftir gamla vegnum til Leirvíkar, har túrurin endar við EFFO-støðina.

Endamálið við MC-Boogie er at savna motorsúkklukoyrarar og motorsúkkluáhugaði til eitt felags tiltak. Talan er ikki um kappkoyring men um væl skipaða koyring, har stórur dentur verður lagdur á skilakoyring, og at ásettar koyrireglur verða hildnar, verður sagt í tíðindaskrivi frá Føroya Ellisakførum.




*Birgir Dam Jacobsen frá Norðbil handar bilin til Alis Eidesgaard frá EB/Streymi*

# Skoda Fabia høvuðsvinningur

Mikudagin læt bilasølan Norðbil ein spildurnýggjan Skoda Fabia til ítróttarfelagið EB/Steym.

Bilurin verður høvuðsvinningur á lutaseðlunum hjá felagnum, sum verða seldir í løtuni.

Drigið verður leygardagin 6. november.